# Kimi Räikkönen sannførdi í Monako

**Finski McLaren/Mercedes koyrarin Kimi Räikkönen vann sannførandi í Monako. Hann varð ongantíð veruliga hóttur. Men hetta merkir ikki, at koyringin varð keðilig**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Kimi Räikkönen var í serflokki á truplu breytini í Monako, og nú er av álvara spenningur komin aftur í formel 1 kappingina*
*Mynd: Reuters*

Monako plagar vanliga at verða tann koyringin, har fæðst bilar koma á mál. Einaferð í 90'unum komu einans fimm bilar á mál. Sunnudagin komu 14 av teimum 18 bilunum á mál, hetta hóast eina hendingaríka koyring við samanstoytum, trygdarbili og fram um alt tættari koyring og flottum yvirhálingum.

Kimi Räikkönen var næstan ongantíð at síggja á sjónvarpsskíggjanum, hann koyrdi sína egnu koyring, meðan nógvu hendingarnar aftanfyri hann kravdu øll myndatólini.

Tá 25 umferðir vóru koyrdar, snaraði Minardi bilurin hjá Christijan Albers runt, og strandaði mitt á koyribreytini. Neyðars David Coulthard varð fyrsti maður á staðnum. Hann fekk akkurát bremsa og snarað rundanum bilin. Michael Schumacher, sum var beint í hølunum á honum, kláraði ikki at bremsa nóg nógv, men rendi beint upp í afturpartin á bilinum hjá Coulthard. Coulthard koyrdi beint í pit, har hann noyddist at gevast við oyðilagdum bili. Michael Schumacher fór eisini í pit við einum brotnum framvongi, gronin á bilinum varð skift og hóast trygdarbilur var komin á breytina, sendi hetta Schumacher á trettanda pláss eina umferð aftan fyri Kimi Räikkönen.

Nógvir koyrarar valdu at fara í pit, meðan trygdarbilurin var á breytini, men ikki Räikkönen, hann valdi at verða verðandi úti á breytini. Í Renault garaguni, fekk onkur reyð oyru. Báðir bilarnir komu inn í senn, og Fisichella misti nógv pláss, tá hann stóð og bíðaði, meðan liðfelagin fekk bensin.

Hetta var sum heild ein skelkandi dagur hjá Renault. At Räikkönen er kvikur, sóu teir í Spania. Tað man neyvan skelka, men bæði Alonso og Fisichella líktust mest koyrandi sjikanum. Øll hini liðini undantikið Minardi og Jordan tyktust skjótari enn Renault bilarnir, og feltið savnaðist aftanfyri teir.

Spenningurin, um hvar meistaraheitið endar, er enn stórur. Serliga var stuttligt at síggja, hvussu væl Williams BMW bilarnir kláraðu seg. Vanliga verður sagt, at í Monako ber ikki til at yvirhála, men Williams koyrararnir Heidfeld og Webber vístu við framúr yvirhálingum yvir Alonso, at tað ber til. Teir lógu stóran part av koyringini aftanfyri Alonso, og spurningurin er, um teir kundu havt avbjóða Räikkönen. Tí sjálvt um McLaren bilurin hjá Räikkönen vann sannførandi, vóru Renault proppanir ein av orsøkunum til hetta.

Trulli breyt sær bilin, tá hann royndi at sleppa framvið Fisichella. Men Toyota vóru sera skjótir, hetta vísti Ralf Schumacher eisini. Hann byrjaði næstseinastur, og koyrdi seg upp á sætta pláss. Einasti maður, sum byrjaði aftanfyri Ralf, var gamli liðfelagin Juan Pablo Montoya, hann megnaði at koyra sín McLaren upp á fimta pláss.

Ferrari vóru aftur í dag óhepnir, Michael Schumacher við sínum óhappi, og Barrichello tá motorurin hjá honum steðgaði í pittinum, hetta tók nógva tíð. Harumframt varð hann revsaður fyri at koyra ov skjótt í pittinum. Men alíkavæl vórðu Ferrari bilarnir bara ávíkavist 0,8 og 1,1 sekund aftanfyri Alonso á fjórða plássi.

Michael Schumacher vísti eitt sindur av villskapi, tá hann kroysti seg framvið Barrichello og upp á sjeynda pláss á síðstu umferðini, og hann mundi sloppið framvið lítlabeiggjanum Ralf Schumacher, tá teir fóru um málstrikuna.

Pínligastu løtuna á degnum átti Jaques Villeneuve. Hann royndi at yvirhála liðfelagan Massa og megnaði at koyra báðar Sauber bilarnar av breytini. Hetta kostaði Sauber stig í dag, tí hóast báðir koyrdu víðari, var dysturin um stigini taptur.

Koyringin var tann mest spennandi koyringin, sum hevur verið í Monako í nógv ár.

## Úrslitið í Monako

| Nr. Koyrari | Land | Bilslag | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 Kimi Räikkönen | Finnland | McLaren-Mercedes | |
| 2 Nick Heidfeld | Týskland | Williams-BMW | + 13,8 sekund |
| 3 Mark Webber | Avstralia | Williams-BMW | + 18,4 sekund |
| 4 Fernando Alonso | Spania | Renault | 36,4 sekund |
| 5 Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | 36,6 sekund |
| 6 Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 37,1 sekund |
| 7 Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 37,2 sekund |
| 8 Rubens Barrichello | Brasilia | Ferrari | 37,5 sekund |
| 9 Felipe Massa | Brasilia | Sauber-Petronas | 1 umferð |
| 10 Jarno Trulli | Italia | Toyota | 1 umferð |
| 11 Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 1 umferð |
| 12 Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 1 umferð |
| 13 Tiago Monteiro | Portugal | Jordan-Toyota | 3 umferðir |
| 14 Christijan Albers | Holland | Minardi-Cosworth | 5 umferðir |
| 15 Vitantonio Liuzzi | Italia | Red Bull Racing | (kom ikki á mál) |
| 16 Patrick Friesacher | Eysturríkið | Minardi-Cosworth | (kom ikki á mál) |
| 17 David Coulthard | Skotland | Red Bull Racing | (kom ikki á mál) |
| 18 Narain Karthikeyan | India | Jordan-Toyota | (kom ikki á mál) |

## Støður, Formel 1

**Koyrarar**

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 49 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 27 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 26 |
| Mark Webber | Australia | BMW-Williams | 18 |
| Nick Heidfeld | Týskland | BMW-Williams | 17 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 17 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | 14 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 14 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 12 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 10 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 9 |
| Alexander Wurz | Eysturríki | McLaren-Mercedes | 6 |
| Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 5 |
| Pedro de la Rosa | Spania | McLaren | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Felipe Massa | Brasil | Sauber-Petronas | 2 |
| Vitantonia Liuzzi | Italia | Red Bull | 1 |

**Bilar**

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 63 |
| McLaren | 51 |
| Toyota | 43 |
| BMW-Williams | 35 |
| Ferrari | 21 |
| Red Bull | 14 |
| Sauber-Petronas | 7 |